## 49 metrar um sekundið í Klaksvík



Taðvar rættiliga nógvur vindur nógvastaðni leygarkvøldið, men tann harðasta hvirlan var í Klaksvík. Tað var klokkan 21.20 leygarkvøldið, at vindmátarin, sum Landsverk hevur í Klaksvík, setti dagsins met, tá hann máldi 48,9 metrar um sekundið. Tað var nógv tann harðasta hvirlan, men annars var mesti vindur í Klaksvík um 30 metrar um sekundið. Ættin var landssynningur. Men tað var ikki bara í Klaksvík, at vindmátararnir hjá Landsverki svingaðu upp og niður leygarkvøldið. Klokkan 21.20 vísti vindmátarin við Stórutjørn 31 metrar um sekundið, í Porkeri vóru 29 metrar um sekundið, og á Norðadalsskarði og á Høgareyni var mesta vindferðin 27 metrar um sekundið. Mesta vindferðin í Sandoynni var 24 metrar um sekundið, og á Krambatanga máldi vindmátarin 22 metrar.

# Eingin olja i Skálafirði



*Eingin olja i Skálafirði*

**Sunnumorgunin vóru vit ein túr eftir sandinum í Skálafirði, og líkt var ikki til, at oljan, sum er likin úr Olshanu, enn hevur gjørt nakað serligt um seg í Skálafirði**

OLSHANA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir at russiski trolarin sakk við Flesjarnar fríggjamorgunin beint fyri klokkan 08, legði hann seg við lágætt.

Bæði í Sundalagnum og á Skálafjørðinum varnaðust fólk skjótt oljuroyk í lotinum, og longu fríggjakvøldið og leygardagin sást olja nógvastaðni eftir sjónum.

Sundalagið er opið norður ígjøgnum, og tí er hugsandi, at oljan, sum ikki rekur upp á land og liggur og dálkar fram við landi, við tíðini antin rekur norður ígjøgnum ella suður aftur gjøgnum Sundalagið.

Hinvegin er Skálafjørðurin ”tættur”, soleiðis at olja ikki kann reka ígjøgnum fjørðin eins og í Sundalagnum.

Sunnumorgunin var Sosialurin ein túr inni í Skálafirði og hugdi at, hvussu vorðið var har eftir lágættarvindin, sum var leygarkvøldið.

Líkt var ikki til, at oljan enn hevur gjørt nakað serligt um seg í Skálafirði.

Sandurin var reinur, og eingin olja sást á sjónum. Vit sóu heldur ongan deyðan ella oljudálkaðan sjófugl.

Tíbetur, kunnu vit leggja aftrat.



## Sjófrágreiðingin væntandi í morgin

**Størsti parturin av skipsbrotnu fiskimonnunum fer væntandi heim aftur til Russlands seinni í dag. Fimm av manningini mugu bíða nakrar dagar afturat, tí sjófrágreiðingin verður fyrrapartin ímorgin**

OLSHANA
*Finnur Jensen*
*Finnur@sosialurin.fo*

Fyrrapartin í dag vórðu skipsbrotnu fiskimenninir á Olshanu staddir í Sørvági. Arbeitt verður nú við at leiga eitt flogfar, sum eftir ætlan skal flúgva manningina, ið telir 35 mans, heim aftur til Russlands seinni í dag. Fimm av manningini, har ímillum skiparin og fyrsti stýrimaðurin, mugu tó bíða, tí sjófrágreiðingin verður kl. 8 í morgin fyrrapart.

Árni Dam, russiskur konsul og umboðsmaður hjá russiska reiðarínum, sigur, at manningin hevur tað gott eftir umstøðunum.

Øll hava verið sera hjálpsom, og manningin hevur møtt stóra vælvild allastaðni frá, sigur Árni Dam.

Manningin hevur fingið innivist í Kommunuskúlanum í Havn og í Vallaraheiminum við Hotel Føroyar. Í nátt vórðu allir menninir savnaðir í Sørvági – har teir fingu innivist ávikavist á Hotel Vágum og hjá privatum í bygdini.

Russiski skiparin, sum fekk insulinsjokk og varð fluttur við skjóttgangandi báti til lands og beint á Landssjúkrahúsið, hevur tað betur. Hann er útskrivaður og er nú staddur í Sørvági saman við restina av manningini.

Sum skilst hava tey leitað eftir leiguflogfari alt vikuskiftið, og sambært Árna Dam stóð eitt flogfar í boði longu fríggjakvøldið, men tokan á flogvøllinum gjørdi, at hetta bleiv av ongum.

# Regatta 2007

Árliga regatta-siglingin, sum Hósvíkar Róðrarfelag skipar fyri, verður komandi vikuskiftið. Siglt verður av Eiði fríggjakvøldið 10. august kl. 19.00 til Hósvíkar.

Kostnaðurin fyri at vera við á ”Regatta 2007” er einans 100,- fyri hvønn. Íroknað er tann heita máltíðin, morgunmatur og ein av teimum serligu regattablusunum. Tá komið verður til Hósvíkar, standa harmonikumenn og spæla á havnalagnum, og verða allir luttakararnir bodnir til eina heita máltíð í Bygdarhúsinum.

Og uppaftur seinni verður skipað fyri góðum ”Regatta-dansi” í somu hølum. Leygarmorgunin eru allir luttakararnir somuleiðis bodnir til morgunmatar í Bygdarhúsinum, áðrenn leiðin gongur víðari til Nólsoyar seinnapartin, har nólsoyingar skipa fyri Ovastevnu.




Lesið
Sosialin
-so eru tit við!